Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar
## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 6. august 2007**

### Maskinmeistari
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, líka mikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið. Byrjar aftur í august 2007.

### Maskinistur
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mðr.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar aftur í august 2007.

### Skipari
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

### Skipsførari
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár. 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í august 2007.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.



Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

**Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2007.**
Umsóknarblað kann heintast á heimasíðu okkara.

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80

